

## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum
Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

# Tofta skúli søkir eftir avloysara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Tíðarskeiðið verður frá 6. november til 6. juni 2008

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær:**
- føroyskt, rokning, sang, kristni í 1. flokki og 9. flokki
- tónleikabreyt 10. flokki
- stuðul í flokkum og hjá næmingum

**Vit vænta at tú:**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Lærarаútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 28. oktober kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur 198 næmingar í 1. – 10.fl. og 27 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof/

# EYSTUROYAR BETONG

vit átaka okkum alt stoypiarbeiði eitt nú:
Grundir - soklar - trappur - garðar o.a.

Ring og fá eitt óbindandi tilboð

**Eysturoyar Betong**
Tlf. 212090 - 223866

## Sjómannskvinnuringurin í Kollafirði

kemur saman í Missiónshúsinum
**mikukvøldið 15. oktober kl. 20:00**

**Allar kvinnur eru vælkomnar.**

**Sjómannskvinnuringurin í Kollafirði**
*Mary Thomassen*

## STARV
## sum havnastjóri/havnameistari við Fuglafjarðar havn

Starvið sum havnastjóri/havnameistari við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann 01. desember 2008 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur at hava dagligu leiðsluna av Fuglafjarðar havn, somuleiðis sum tú eisini í starvinum kemur at átaka tær uppgávur við at marknaðarføra havnina saman við býráðsleiðsluni í tøttum samstarvi við havnanevndina og býráð.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving, førleika í enskum máli bæði í talu og skrift, somuleiðis sum tú skalt duga at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðslamboð.
Haraftrat skal tú eisini hava hollar leiðsluførleikar frá almennari ella privatari vinnu, og ávísar royndir innan sjóvinnu.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fær møguleika fyri at menna havnina.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag, somuleiðis verður skrivligur sáttmáli gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

**Starvstreytir:**
Umsøkjarar við viðkomandi royndum hava fyrimun.

Royndartíðin verður sambært avvarðandi sáttmála.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin **03. november 2008 kl. 15.00.**

**Fleiri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 09. oktober 2008*

**Fuglafjarðar býráð**

## Handilshøli í Tórshavn til leigu

Hølið har, sum kiosk Svalin Varðagøta 65 er, er nú til leigu.

Hølið er væl egna til ymisk endamál.

**Áhugaði kunnu ringja 59 46 30**

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# KUNNGERÐ
## UM VALEVNISLISTAR TIL KOMMUNUVALIÐ Í FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at sambært kunngerð frá Løgmálaráðnum, dagfest 23. september 2008 verður kommunustýrisval í Fuglafjarðar kommunu **týsdagin tann 11. november 2008.**

Ein valevnislisti kann í mesta lagi hava 13 valevni og skal verða undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal verða ein serligur listi yvir stillarar, hvar teir skiliga eru lýstir við navni, starvi og bústaði.

Ein persónur kann bert verða stillari á einum lista.

Valevnislistar skulu latast inn til *Jákup Frants Larsen*, býráðsskrivara ella *Arnold Abrahamsen*, valnevndarformann **í seinasta lagi 21. oktober 2008 kl. 18.00** av einum stillara.

Uppskot um, hvussu ein valevnislisti eigur at verða settur upp, kann verða fingið til vega við at venda sær til býráðsskrivstovuna ella valnevnevndarformannin.

Avgreiðslutíðirnar á býráðsskrivstovuni eru millum kl. 10.00 og 15.00 mánadag til og við fríggjadag.

Býráðsskrivstovan hevur tann 21. oktober 2008 opið til kl. 18.00.

*Fuglafjørður, tann 01. oktober 2008*

**Kommunuvalnevndin**
Arnold Abrahamsen
formaður

## Kunngerð
um framløgu av vallista

Til kommustýrisvalið 11. november 2008 í Sørvágs kommunu er vallistin til skjals á kommunuskrivstovuni frá **14. oktober til 28. oktober 2008**. Kæru um skeivleikar á listanum skulu sendast valnevndini í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin.

**Avgreiðslutíðin á kommunuskrivstovuni eru**

| | |
|---|---|
| mánadag til mikudag | 10.00 til 13.00 |
| hósdag | 11.00 til 17.00 |
| fríggjadag | 10.00 til 12.00 |

*Sørvágur, 10. oktober 2008*

Oddur Petersen, form

**Sørvágs Kommuna**